KØKUR

Totalt **offside!**

Rangstøðufellan í fótbólti kann tykjast innviklað at skilja. Og mannfólk hava hug at halda, at konufólk skilja so í øllum førum einki av offside. Og helst er tað onkur av hesum mannfólkunum, sum her hevur gjørt eina roynd at greiða konufólki frá prinsippinum í rangstøðureglunum.

Menn snakka

Menn kunnu siga so nógv, eisini tá kvinnur tosa. Men hvat merkir tað, tá ið menn siga nakað. Her er ein roynd at týða veruligt mannafólkmál.

"Skal eg hjálpa tær við døgurðanum?"
Týtt: Hví er døgurðin ikki longu á borðinum?

"Tað tekur ov langa tíð at forklára tær tað"
Týtt: Eg havi ikki ánilsi fyri, hvussu tað hongur saman.

"Hatta ljóðar áhugavert, góða"
Týtt: Snakkar tú enn?

"Nú mást tú ikki stressa teg"
Týtt: Eg hoyri ikki ljóðið frá fótbóltsdystinum fyri støvsúgvaranum.

"Hatta er eitt mannfólkating"
Týtt: Tað er avgjørt eingin skilagóður samanhangur í tí, og eingin skilur nakað av tí.

"Eg finni tað ikki"
Týtt: Tað datt ikki niður í mínar opnu hendur, og eg tími ikki at leita. Kanst tú ikki finna tað fyri meg?

"Hvat havi eg nú gjørt skeivt?"
Týtt: Hvat hevur tú nú funnið út av, at eg havi gjørt skeivt?

"Eg hoyri teg"
Týtt: Eg hoyrdi ikki ein pinn av tí, sum tú segði, og eg hopi ikki, at tú spyrt meg aftur um tað, tí so verði eg avdúkaður.

"Tú sært gott út í hasum"
Týtt: Vælsignaða, gevst og skift klæðir. Kom avstað, eg eri gorhungraður nú.

"Eg eri ikki vilstur. Eg veit akkurát, hvar vit eru"
Týtt: Eingin sær okkum á lívi aftur!

Í RANGASTRÚPAN

Jú, tað gera tey!
Hotdogs og kips tæna ongum endamáli
Sosialurin

Onku hevur misskilt okkurt
Snapsur: Vatnið skal gera munin
Dimma

Veturin komin
Holst er kaldur sum ein fiskur
Sosialurin

Nýggj ítróttargrein
Indianarahondbóltur í Hoyvík
Dimma

Maskulint navn fyri eina kvinnu
- Vit eru fullgreið yvir, at Paul Watson og Sea Shepherd ætla sær til Føroyar í summar. Tað sigur Peter Thaysen, politiovasti.
- Og vit eru eisini til reiðar at taka ímóti honum, leggur hon afturat.
Sosialurin

Altso, hann er ikki farin
Norskur fótbóltsfjeppari minnist Kurt
Norðlýsið

Tað er vist!
Vit burdu verið fleirið føroyingar
Sosialurin

Nú skuldi ligið væl fyri
Eingin vakthavandi á Politigarðinum
Dimma

Stórur kjallari
Býur og býarbørn í Posthúskjallaranum
Portal.fo

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS

Helvitis danskarar

Hasir helvitis danskararnir. So vóru teir her aftur við revolvaranum, lødda revolvaranum, kalibur 46. Teir eru einki fittir, siga tey, hvørki nú ella í advent.

So er tað sagt, men føroyingar hava vitað síðani síðst í september, september í ár gamaní, at Eik var til sølu.

Javell, ja, og hvat so? Ikki fyrr enn nakrir danskarar koma til Havnar og siga bøøøøøø hart á einum tíðindafundi, vakna føroyingar. Ha, er Eik til sølu? Og pínadoyð, her er mín sann ein freist eisini. Vit hava ikki, sum vit plaga, ein hálvan ævinleika til at hugsa, seta arbeiðsbólkar og toymi og fara í eina tómgongd, orsaka tilgongd, og síðani ein fjórðings ævinleika til at taka avgerðina. Vit hava bara nakrar dagar, nakrar myrkar heystardagar.

Ja, slíkt ber ikki til at bjóða okkum, sum eru von við og ikki vita um annað enn, at einki hevur skund. Deadlines, hvat er tað fyri tvætl? Evstamark. Nu skal du ikke komme her...

Nei, men sama um freistin var tíggju ár, endaðu vit í júst somu støðu, sum vit eru í nú, um knappliga tíggju ár. Eftir níggju ár og tíggjuein mánað og tvær vikur høvdu nakrir dummir danskarar komið til Føroya og sagt bøøøøø á einum tíðindafundi. Nú eru tvær vikur eftir. Og so eru vit ikki fittir longur. Eikin verður feld og brend nýggjársaftan. Eingin skógfriðing her.

Og so sami jammurin omigen, revolari, kalibur 46 og eingin tíð. Og vit kunnu ikki verja okkum hvørki við hvalvákni ella grindaknívi. Tí tað siga onkrir aðrir útlendingar, at tey køksamboðini mugu vit ikki brúka. Vit doyggja av tí, og tað er synd í hvalunum og ríkum ónyttum.

Vit royna at fáa útlendingar at koma higar við sínum pengum uttan at siga teimum, at vit hava ikki eina álítandi streymveiting. Uttan at siga teimum, at útlendingar mugu ikki eiga bankar í Føroyum. Tí so vera bankarnir ikki so fittir við vinnulívið. Vinnulívið, sum hevur so lagaligar sømdir: lán, niðurskriving, sanering, nýtt lán, niðurskriving, sanering, aftur nýtt lán, niðurskriving, sanering. Uttan vinnuna vóru vit ikki her.

Hvussu kunnu danskarar og aðrir útlendingar eisini vita, at í Føroyum eru bankar almannastovur hjá vinnuni? Tað fáa íleggjarar, sum vit royna at lokka til Føroya við pengum, heldur ikki at vita.

Lort annars, at vit ikki langt síðani hava yvirtikið hatta málsøkið eisini. Vit duga jú so væl við yvirtøkum og at spæla, at vit eru tjóðir millum tjóðir.

Nú eru eingir privatir pengar eftir at keypa Eik fyri. Pengarnir eru mistir í partabrøvum - í Eik.

Bankaverðin er sera logisk. Hon er beinharður bisniss.

Ætlar onkur sær at skriva doktararitgerð um antilogikk, um nøkur frøði ella vísindi kallast so, eru Føroyar og føroyingar eitt himmíríki at granska og skriva um.

Meðan dovna sjampanjan, har seinasta bløðran er brostin, í tímaglasinum hjá Eik rennur niður, brúka politikarar tíðina til at keglast um til skal bera at keypa sær í konjakkglasið í einum handli millum aðrar handlar.

Føroyskur rúsdrekkapolitikkur on the rocks blandaður við nógvum óblandaðum roski.

Tað er okkara skyld. Onnur hava skyldina, onnur hava altíð skyldina. Hygg, tað er ein uggi, sum fløvar í jólahugnanum.

Og týsdagin vóru 1500 dagar til ár 2015. 1500 dagar og 1500 nætur eftir til at gerast heimsins besta land, The Land of Maybe and Temporary. Bøøøøøøøøøøøøøøøøøøøøø.